Búnaðargrunnurin

Ársroknskapur fyri 2018

Staravegur 17 · Postboks 3258
FO-110 Tórshavn · Faroe Islands

Telefon +298 34 34 34
Telefax +298 34 34 35

spekt@spekt.fo
www.spekt.fo

Sp/f. no. 2732

Innihaldsyvirlit

Upplýsingar um grunnin 2

Leiðslufrágreiðing 4

Roknskaparátekning leiðslunnar 8

Grannskoðanarátekning frá óheftum grannskoðara 9

Nýttar roknskaparreglur 12

Rakstrarúrslit fyri árið 1. januar - 31. desember 16

Fíggjarstøða 31. desember 17

Notur 19

Upplýsingar um grunnin

Búnaðargrunnurin
Postboks 50
R. C. Effersøesgøta 4
110 Tórshavn

Telefon: 35 35 80
Telefaks: 35 35 81

Roknskaparár nr. 15

Heimstaður: Tórshavn

Stýrið

Valdir limir:

Símun Gullaksen, formaður
bóndi

Una Joensen, næstformaður
búskaparfrøðingur

Birta Biskopstø
løgfrøðingur

Rani Slættanes
sølu- og innkeypsleiðari

Niels Winther Poulsen
løgfrøðingur

Varalimir:

Eynar Martin Kjærbo
bóndi

Esther Dahl
cand.negot.

Dánial Christoffersen
figgjarleiðari

Christian Danielsen
búskaparfrøðingur

Stjórn

Regin I. Jakobsen

Upplýsingar um grunnin

Grannskoðan

SPEKT løggildir grannskoðarar Sp/f

Peningastovnar og ognarrøktarar

Bank Nordik
Eik Banki
Norðoya Sparikassi
Suðuroyar Sparikassi
PP Capital
Skandinaviska Enskilda Banken

Leiðslufrágreiðing

Virksemi

Endamál Búnaðargrunsins er at veita fígging til menning av føroyskum landbúnaði og at fíggja kostnaðin av at reka jarðarumsitingina (Búnaðarstovuna), sambært løgtingslóg nr. 34 frá 7. mai 2013 um Búnaðargrunn, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 80 frá 22. mai 2015.

Herumframt umsitur grunnurin festikontur, felags festipulju og kontur fyri mist bit og stendur fyri allari innkrevjing av festileigum, traðarleigum og øðrum leigum.

Ársúrslit

Inntøkurnar í 2018 eru 2.856 tkr. móti 8.604 tkr. árið fyri, og er hetta ein lækking upp á 5.748 tkr. Rentuinntøkur av útlánum vóru 3.342 tkr., av virðisbrøvum og avtaluinnlánum var eitt hall á 948 tkr. og rentuinntøkurnar av innistandandi vóru um 266 kr.

Rentuinntøkurnar av útlánum lækkaðu við 386 tkr. Inntøkurnar av virðisbrøvum og avtaluinnlánum lækkaðu við 5.260 tkr., meðan rentuinntøkurnar av innistandandi peningi eru so at siga óbroyttar.

Lækkingin í inntøkunum stavar sostatt í høvuðsheitinum frá gongdini á virðisbrævamarknaðinum.

Samlaðu rakstrarútreiðslurnar fyri 2018 vórðu 7.147 tkr., sum eru 2 tkr. minni enn fyri 2017, tá talan var um 7.149 tkr.

Úrslitið aftaná avskrivingar og avsetingar móti tapi uppá skuldarar gjørdist eitt hall á 4.106 tkr. fyri 2018 í mun til eitt avlop á 3.648 tkr. fyri 2017. Hetta stavar frá omanfyri nevndu broytingum, umframt at netto eru inntøkuførdar 185 tkr. í avsetingum til væntað tap upp á útlán.

Útlánini eru hækkað við 586 tkr., úr 87.680 tkr. upp í 88.265 tkr., og stavar henda broyting frá eini hækking í útlánum upp á 247 tkr., samstundis sum avsetingin ímóti tapum er minkað við 339 tkr.

Rentur og kursjavningar av virðisbrøvum góvu eitt hall á 948 tkr. í 2018 í mun til 4.312 tkr. í avlopi fyri 2017. Talan er sum nevnt um eina lækking á 5.748 tkr. Virðisbrævamarknaðurin verður framvegis mettur sera avbjóðandi við met lágum rentustigi, og sæst hetta aftur í úrslitinum fyri 2018. Enn er henda gongd ikki reiðiliga vend, og hevur hon havt fallandi virðisbrævakursir við sær. Fyri at bøta um avkastið av virðisbrøvum og minka um váðan tók grunnurin í 2016 tí stig til at spjaða íløgurnar nakað meira, og aftur í 2017 varð eitt stig tikið á somu leið. Hóast úrslitið fyri 2018 er merkt av rumbli á marknaðinum, serliga fram ímóti ársloki, kann sigast, at hetta higartil hevur hepnast toluliga væl. Tað bakkast marknaðurin hevði seint í 2018 er alt vunnið inn aftur í nýggja árinum og meira afturat. Marknaðurin er kortini framvegis avbjóðandi, og neyvan kunnu væntast tey stóru avkøstini komandi árini.

Annars kann í hesum sambandi viðmerkjast, at ein av minni hepnu íløgunum hjá grunninum í síni tíð varð gjørd í virðisbrøv, sum amerikanska stórfyritøkan Lehman Brothers stóð aftanfyri. Lehman Brothers fór av knóranum í 2010 og var trygdin tískil burtur. Hóast hetta eru nú góðir tveir triðingar av íløguni komnir inn aftur, og framvegis kemur peningur inn hesum viðvíkjandi.

Verður hugt at myndunum á næstu síðu kann sigast, at tað samanumtikið hevur verið ein skilagóð loysn at gera íløgur í virðisbrøv, bæði tá ið hugsað verður um avkast og trygd, eisini sjálvt um 2018 ikki royndist serliga væl. Myndirnar vísa gongdina á virðisbrøvum frá byrjan í 2001 til árslok 2018.





- Innlán (reyður litur) svarar til at peningurin varð settur á innlánskontur, við teirri til eina og hvørja tíð hægstu møguligu rentu, ella tað sum eisini kallast DK Repo renta.
- Effas 1 – 5 (bláur litur) svarar til lánsbrævamarknaðin, ella eitt sokallað indeks, sum íløgur grunsins í virðisbrøv verður samanhildin við.
- Ognarrøkt (grønur litur) eru virðisbrøvini hjá Búnaðargrunninum.

Ovara myndin vísir vinningin p.a. fyri hvørt árið sær frá 2001 til 2018 og miðal rentuna fyri tíðarskeiðið. DK Repo rentan hevur í miðal givið 1,71%, meðan virðisbrøvini hava givið 2,89% í miðal fyri tíðarskeiðið.

Niðara myndin vísir eina samanlegging (akkumulering) av, hvussu nógvar krónur hvørt virðisbræv á 100 kr. hevur kastað av sær fyri árini 2001 til 2018. T.v.s. at virðisbrøvini hava givið 66,28 kr. fyri hvørjar 100 kr., meðan DK Repo renta hevði givið 35,38 kr. fyri hvørjar 100 kr. í sama tíðarskeiði.

Grunnurin er minkaður úr 105,0 mió.kr. niður í 100,9 mió.kr. og stavar munurin frá rakstrarúrslitinum.

Festikontan er vaksin úr 135,7 mió.kr. upp í 136,2 mió.kr. Høvuðsorsøkin til hækkingina á 0,5 mió.kr. er at finna í sølu av almennari jørð fyri 9,4 mió.kr. Hinvegin eru 9,2 mió.kr. fluttar til felags festipulju. Her skal viðmerkjast, at nakað er játtað av festikontu og felags festipulju til verkætlanir, sum eru í gerð í løtuni, og verða útgoldnar festarum so hvørt arbeiðið verður framt.

Lógin fyri bit er broytt í mai 2009, soleiðis at mist bit fyri ognarhagar ikki longur verður goldið á kontu í Búnaðargrunninum, men beinleiðis til eigararnar. Umframt hetta er lógin broytt soleiðis, at tann parturin, sum hoyrir til landsjørð, hevur fingið aðrar treytir fyri at fáa pening útgoldnan.

Hendan lógarbroyting hevur við sær, at tað ikki verður goldin eins nógvur peningur á kontu í Búnaðargrunninum fyri mist bit í framtíðini, sum undanfarin ár, eins og at roknast kann við størri útgjaldingum av kontu fyri mist bit komandi árini.

Umframt hetta kann nevnast, at sambært løgtingslóg nr. 66 frá 26. mai 2011 um broyting í løgtingslóg um Búnaðargrunn eru nú fluttar 54,4 mió.kr. til felags festipulju. Fyri árið 2018 vórðu sum nevnt fluttar 9,4 mió.kr. av festikontu til felags festipuljuna.

Mett verður, at hendan broytingin í størri mun kann koma øllum landbúnaðinum í landinum at gagni, við tað at eisini festarar í útjaðaranum, har ofta einki er á festikonto, eisini fáa møguleikan at søkja um fígging av felags festipuljuni. Seinnu árini hava staðfest, at so er, tí fjós verða bygd og umbygd, eins og seyðahús verða bygd. Fleiri áhugaverdar verkætlanir verða sostatt gjøgnumførdar meðan aðrar eru í umbúna. Eisini betrar felags festipuljan um møguleikarnar at velta, ikki minst hjá mjólkarframleiðarunum.

Í 2013 vórðu sambært lóg játtaðar úr Búnaðargrunninum 24,7 mió.kr. yvir 6 ár, ella 4,1 mió.kr. um árið til studning til egið framleitt stráfóður. Hetta fyri at stuðla undir fóðurframleiðsluna og fyri at minka um útreiðslurnar til keypt fóður hjá bóndunum. Játtanin hevur minkað um fæ grunsins, men hevur ivaleyst betrað um raksturin hjá mjólkarframleiðarunum.

Afturat hesum eru í 2013 sambært somu lóg játtaðar 5,1 mió.kr. úr grunninum til bráðneyðugar ábøtur á bygningar hjá Búnaðarstovuni í Kollafirði. Hóast hesar ábøtur tá vórðu mettar átrokandi er einki brúkt av avsetingini enn, annað enn ein lutfalsliga lítil upphædd í 2018, og átti henda avseting eftir Búnaðargrunsins bestu sannføring tí at verið førd aftur.

Umframt omanfyristandandi vórðu 6 mió.kr. settar av til tjóðargarðsætlanina í Koltri. Hesar eru seinni býttar sundur í 5 mió.kr. til antikvariska serskipan og 1 mió.kr. til serføroysk húsdjór.

Fíggjarjavni

Fíggjarjavnin við árslok er 315.961 tkr. Av hesum er eginognin 303.070 tkr., sum svarar til 95,9%.

Roknskaparátekning leiðslunnar

Stýrið og stjórnin hava í dag viðgjørt og viðtikið ársroknskapin og ársfrágreiðingina fyri Búnaðargrunnin fyri 2018.

Roknskapurin er greiddur úr hondum í samsvari við "Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o.t.". Vit meta, at tær nýttu roknskaparreglurnar eru hóskandi, soleiðis at ársroknskapurin gevur eina rætta mynd av inntøkum og útreiðslum í fíggjarárinum, og somuleiðis av ognum og skuld um fíggjarárslok 2018.

Harumframt meta vit, at leiðslufrágreiðingin inniheldur eina rættvísandi frágreiðing um tey viðurskifti, sum frágreiðingin umrøður.

Ársroknskapurin verður lagdur fram til góðkenningar.

Tórshavn, hin 29. mai 2019

Stjórn:

Regin I. Jakobsen

Stýrið:

Simun Gullaksen
formaður

Una Joensen
næstforkvinna

Birta Biskopstø

Rani Slættanes

Niels Winther Poulsen

Góðkendur á fundi stýrisins, hin / 2019

Fundarstjóri:

Grannskoðanarátekning frá óheftum grannskoðara

Til stýrið í Búnaðargrunninum

Grannskoðanarátekning á ársroknskapin

Niðurstøða

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Búnaðargrunninum fyri roknskaparárið 1. januar–31. desember 2018 við rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu, eginpeningsuppgerð og notum, íroknað nýttan roknskaparhátt.

Ársroknskapurin er gjørdur eftir "Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o.t."

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin í øllum týðandi lutum er rættur t.v.s. gjørdur í tráð við "Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o.t." Tað er somuleiðis okkara fatan, at tað eru settar á stovn mannagongdir og innanhýsis eftirlit, sum stuðla undir, at tær avgerðir, sum eru fevndar av ársroknskapinum eru í tráð við givna játtan og aðrar reguleringar og við gjørdar avtalur og vanliga siðvenju.

Grundarlag fyri niðurstøðuni

Vit hava grannskoðað samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og eftir øðrum ásetingum í føroysku grannskoðaralógini og eisini "Løgtingslóg nr. 25 frá 21. apríl 1999 um grannskoðan av landsroknskapinum vm. og góðum almennum grannskoðanarsiði. Okkara ábyrgd sambært hesum standardum og krøvum er nærri lýst í grannskoðanarátekningini í pettinum "Ábyrgd grannskoðarans av grannskoðanini av ársroknskapinum". Vit eru óheft av stovninum samsvarandi altjóða etisku reglunum fyri grannskoðarar (etisku reglurnar hjá IESBA) og øðrum ásetingum, ið eru galdandi í Føroyum, eins og vit hava lokið onnur etisk krøv, sum vit hava sambært hesum krøvum og reglum. Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kunnu vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, sum í øllum týðandi lutum er rættur t.v.s. gjørdur í samsvari við "Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o.t." Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av innanhýsis eftirlitinum, ið leiðslan metir skal til, fyri at gera ein ársroknskap uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

Tá ið ársroknskapurin verður gjørdur, hevur leiðslan ábyrgdina av at meta um, hvørt stovnurin megnar at halda fram við rakstrinum, og har tað er viðkomandi at upplýsa um viðurskifti viðvíkjandi framhaldandi rakstri og at gera ein ársroknskap eftir roknskapar-ásetingunum um framhaldandi rakstur, uttan so at leiðslan hevur aðrar ætlanir við stovninum.

Grannskoðanartekning frá óheftum grannskoðara

Ábyrgd grannskoðarans av grannskoðanini av ársroknskapinum

Endamál okkara er at fáa eina grundaða vissu fyri, at ársroknskapurin sum heild er uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, og at gera eina grannskoðaraátekning við eini niðurstøðu. Grundað vissa er vissa á høgum stigi, men er tó ikki ein trygd fyri, at grannskoðan framd samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum umframt góðum almennum grannskoðanarsiði altíð kann avdúka týðandi skeivleikar, um slíkir eru. Skeivleikar kunnu koma fyri orsakað sviki ella mistøkum og mugu metast at verða týðandi, um tað er sannlíkt, at teir hvør sær ella saman kunnu metast at hava ávirkan á fíggjarligu avgerðirnar, ið roknskaparabrúkararnir taka við støði í ársroknskapinum.

Tá ið vit grannskoða samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum umframt góðum almennum grannskoðanarsiði, gera vit yrkisligar metingar og varðveita professionella ivasemið undir grannskoðanini. Harumframt:

- Eyðmerkja og meta vit um váðan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, leggja til rættis og grannskoða samsvarandi hesum váða og fáa til vega grannskoðanarprógv, ið eru nóg góð og egnað sum grundarlag undir okkara niðurstøðu. Váðin fyri, at vit ikki avdúka týðandi feilir orsakað av sviki, er størri enn váðin fyri, at feilir orsakað av mistøkum ikki verða avdúkaðir, av tí at svik kann umfata samansvørjing, skjalafalsan, tilætlaða dyljan, villleiðing ella at innanhýsis eftirlit verða skúgvað til viks.
- Fáa vit fatan av tí innanhýsis eftirliti, ið er viðkomandi fyri grannskoðanina, soleiðis at vit kunnu leggja grannskoðanina til rættis á nøktandi hátt eftir umstøðunum, men ikki fyri at gera eina niðurstøðu um, hvussu virkið innanhýsis eftirlitið er.
- Taka vit støðu til, um tann av leiðsluni nýtti roknskaparháttur er hóskandi, eins og vit meta um, hvørt roknskaparligu metingarnar og tilhoyrandi upplýsingar frá leiðsluni eru rímiligar.
- Taka vit støðu til, um tað er hóskandi, at leiðslan hevur valt at gera roknskapin grundað á roknskaparháttin um framhaldandi rakstur, og um tað við støði í teimum grannskoðanarprógvum, ið eru fingin til vega, er týðandi óvissa ella viðurskifti, ið kunnu elva til týðandi óvissu um, hvørt stovnurin megnar at halda áfram. Er niðurstøðan, at tað er týðandi óvissa, skulu vit gera vart við hetta í grannskoðanaráteknningini við at vísa til upplýsingar hesum viðvíkjandi í ársroknskapinum ella, um hesar upplýsingar ikki eru nøktandi, tillaga okkara niðurstøðu. Okkara niðurstøður eru grundaðar á tey grannskoðanarprógv, ið eru fingin til vega fram til dagin, tá ið okkara grannskoðaraátekning verður undirskrivað. Hendingar í framtíðini ella viðurskifti kunnu tó elva til broytingar í hesum viðurskiftum.
- Taka vit støðu til samlaðu framløguna, bygnaðin og innihaldið í ársroknskapinum, íroknað upplýsingarnar í notunum umframt um ársroknskapurin vísir transaktiónir, sum liggja undir, og hendingar á ein slíkan hátt, at tað gevur eina rættvísandi mynd.

Grannskoðanartekning frá óheftum grannskoðara

Vit samskifta við ovastu leiðsluna um millum annað vavið á ætlaðu grannskoðanini, og nær vit vænta at grannskoða. Harumframt samskifta vit um týðandi eygleiðingar í sambandi við grannskoðanina so sum týðandi manglar í innanhýsis eftirlitinum, ið vit eru komin fram á í sambandi við grannskoðanina.

Ummæli av leiðslufrágreiðingini

Leiðslan hevur ábyrgdina av leiðslufrágreiðingini.

Okkara niðurstøða um ársroknskapin fevnir ikki um leiðslufrágreiðingina, og vit geva ikki nakra váttan við vissu um leiðslufrágreiðingina.

Tað er okkara ábyrgd, í sambandi við grannskoðanina av ársroknskapinum, at lesa leiðslufrágreiðingina og í hesum sambandi meta um, hvørt samanhangur er millum leiðslufrágreiðingina og ársroknskapin, ella um hon er í mótsøgn við ta vitan, ið vit hava fingið undir grannskoðanini, ella á annan hátt er tengd at týðandi skeivleikum.

Okkara ábyrgd er harumframt at hugsa um, hvørt leiðslufrágreiðingin hevur kravdu upplýsingarnar samsvarandi ársroknskaparlógini.

Grundað á gjørda arbeiðið, er tað okkara fatan, at leiðslufrágreiðingin samsvarar við ársroknskapin, og at hon er gjørd samsvarandi krøvunum í ársroknskaparlógini. Vit eru ikki vorðin varug við týðandi feilir í leiðslufrágreiðingini.

Tórshavn, hin 29. mai 2019
SPEKT løggildir grannskoðarar Sp/f

Jóhannes Færø
statsaut. revisor

Nýttar roknskaparreglur

Ársroknskapurin fyri Búnaðargrunnin fyri 2018 er gjørdur í samsvari við ásetingarnar í "Kunngerð nr. 22 frá 14. mars 2007 um roknskaparverk landsins o.t.", tó soleiðis, at niðurskrivingar móti væntaðum tapum upp á útlán eru viðgjørdar samsvarandi reglunum fyri peningastovnar.

Ársroknskapurin er gjørdur eftir somu roknskaparreglum sum undanfarna ár, tó eru kontur fyri mist bit fluttar á serstaka linju undir eginognini.

Um innrokning og virðisáseting í ársroknskapinum

Ognir verða tiknar við í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt at grunnurin fær framtíðar fíggjarligar ágóðar, og virðið á ognunum kann gerast upp álítandi.

Skyldur verða tiknar við í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt at grunnurin í framtíðini skal av við fíggjarligar ágóðar, og støddin á skyldunum kann gerast upp álítandi.

Ognir og skyldur verða í fyrsta umfari tiknar við til kostpris. Síðani verða ognir og skyldur tiknar við sum lýst niðanfyri fyri hvønn roknskaparpost sær.

Roknskaparligar metingar

Virðisásetingin av útlánum grunsins er tengd at metingum hjá leiðsluni um hvørja ávirkan framtíðar hendingar kunnu hava á virðið á útlánum.

Metingarnar hjá leiðsluni eru gjørdar við støði í teimum royndum, sum leiðslan hevur við lánsveiting til ymsar bólkar av lántakarum umframt fyritreytum, sum leiðslan eftir umstøðunum metir verða ráðiligar, men sum eru óvissar og torførar at siga nakað um.

Um fyritreytirnar, sum metingarnar byggja á, broytast ella um grunnurin fær nýggja vitan um ávís øki, kann tað fáa ávirkan á uppgerðina av roknskaparliga virðinum.

Rakstrarroknskapur

Inntøkur

Leiguinntøkur og rentur av lánum verða inntøkuførdar sambært útsendum rokningum.

Rentur av innistandandi peningi verða inntøkuførdar, tá ið tær verða tilskrivaðar í peningastovnum.

Rentur av virðisbrøvum verða tíðargreinaðar til og við roknskaparárslok.

Útreiðslur

Útreiðslur verða tiknar við í tí roknskapartíðarskeiði tær viðvíkja.

Nýttar roknskaparreglur

Niðurskriving til tap uppá útlán og staðfest tap

Upphæddin fevnir um broytingar í niðurskriving til tap uppá útlán umframt staðfest tap.

Skattur av ársúrslitinum

Skattur av ársúrslitinum fevnir um skatt at gjalda og broyting í útsettum skatti. Skattur, sum viðvíkur ársúrslitinum, verður innroknaður í rakstrarroknskapin og skattur, sum viðvíkur bókingum á eginognini, verður innroknaður beinleiðis á eginognina.

Fíggjarstøðan

Materiell støðisogn

Keyp av materiellari støðisogn verður útreiðsluførd í útveganarárinum.

Útlán og eftirstøður

Útlán verða virðisásett til amortiseraðan kostpris.

Niðurskrivingar verða gjørdar ímóti væntaðum tapum, tá ið tað fyriliggja óvildugar ábendingar um, at eitt útlán ella ein bólkur av útlánum eru lækkað í virði.

Eru óvildugar ábendingar um at eitt einstakt útlán er lækkað í virði, verður lánið niðurskrivað.

Fyri útlán, har tað ikki finnast óvildugar ábendingar um virðislækking fyri hvørt útlán sær, verður mett um niðurskrivingartørvin fyri samlaða bólkin og niðurskrivingartestir verða gjørdar við støði í væntaðum peningastreymum framyvir og við støði í staðfestum tapsroyndum fyri einstaka bólkin. Bólkingin av útlánum tekur fyrst og fremst støði í vinnugrein og lániváða.

Óvildugar ábendingar um virðislækkingar kunnu m.a. vera eftirstøða, versnandi rakstrarúrslit. minkandi tilfeingi og/ella niðurgongd innan ávísar vinnugreinar.

Niðurskrivingarnar verða gjørdar upp sum munurin ímillum tað roknskaparliga virðið á útlánunum og nútíðarvirði av forvæntaðum peningastreymum, herímillum realisatiónsvirðið av møguligum trygdarveitingum. Sum diskonteringsatsur verður tann effektiva rentan, sum er ásett fyri roknskapartíðarskeiðið, nýtt til útrokning av nútíðarvirðinum.

Niðurskriving til tap verður bókað á eina "korrektiv" konto, sum verður mótroknað útlánunum. Broytingar í "korrektiv" konto verða innroknaðar í rakstrinum undir "Niðurskriving uppá útlán og staðfest tap". Vísir tað seg seinni. at virðislækkingin ikki er varandi, verður niðurskrivingin afturført yvir somu konto.

Nýttar roknskaparreglur

Verður staðfest, at eitt lán ikki kann afturgjaldast, verður lánið endaliga avskrivað yvir "korrektiv" konto.

Onnur áogn

Onnur áogn verður upptikin til áljóðandi virði við frádrátti av niðurskrivingum ímóti tapi

Virðisbrøv

Virðisbrøv, sum eru partur av virðisbrævagoymsluni hjá grunninum, verða innroknað til dagsvirði á handilsdegnum sum ogn í umferð og síðan virðisásett til dagsvirði. Broytingarnar í dagsvirðinum verða tiknar við so hvørt í rakstrinum sum "rentuinntøkur vm".

Virðisbrævainntøkur verða vístar sum ein serstakur postur í notunum.

Virðisbrøv, sum eru partur av dagliga gjaldførinum, eru vístar sum ogn í umferð.

Eginogn

Eginogn grunsins er býtt upp í høvuðsgrunn, festikontur, felags festipulju, kontur fyri mist bit og kolagrevstrargrunn.

Høvuðsgrunnurin er settur saman av árliga rakstrarúrsliti grunsins.

Festikontur eru settar saman av inn- og útgjøldum, umframt flytingum sum eru gjørdar til Felagsfestipulju sambært lóg fyri grunnin.

Felagsfestipulja er settar saman av útgjøldum, umframt flytingum sum eru gjørdar frá Festikonto sambært lóg fyri grunnin.

Kontur fyri mist bit eru settar saman av inn- og útgjøldum.

Kolagrevstrargrunnur er settur saman av inn- og útgjøldum.

Inn- og útgjøld av festikontum, felags festipulju og kolagrevstrargrunninum verða innroknað beinleiðis undir nevndu kontur, sum eru bólkaðar undir eginogn grunsins.

Skyldugur skattur og útsettur skattur

Skyldugur skattur og skattaáogn verða innroknað í fíggjarstøðuna sum roknaður skattur av ársins skattskyldugu inntøku javnað fyri skatt frá skattskyldugu inntøkuni fyri undanfarin ár.

Útsettur skattur verður uppgjørdur eftir fíggjarstøðu skuldarháttinum av fyribils munum millum roknskaparligu og skattligu virðini av ognum og skyldum, gjørd upp við støði í ætlaðu nýtsluni av ognini ávikavist afturgjaldan av skylduni.

Nýttar roknskaparreglur

Útsett skattaáogn, íroknað skattliga virðið av framflytingarheimilaðum skattligum halli, verður uppgjørd til tað virði, sum áognin verður mett at kunna realiserast til, antin við javnaði av skatting av framtíðar vinningi ella við mótrokning av útsettum skattaskyldum.

Útsettur skattur verður virðisásettur við støði í teimum skattareglum og skattasatsum, sum við galdandi lóg fíggjarstøðudagin verða galdandi, tá ið tann útsetti skatturin væntandi skal gjaldast. Í teimum førum at skattliga virðið kann gerast upp eftir ymsum skattareglum, verður útsettur skattur virðisásettur við støði í ætlaðu nýtsluni av ognini ávikavist gjalding av skylduni.

Broytingar í útsettum skatti, sum standast av broytingum í skattasatsi, verða innroknaðir í rakstrarroknskapin. Nýtti skattasatsurin í hesum ári er 18%

Skuld

Skuld verður upptikin til áljóðandi virði.

Rakstrarúrslit fyri árið 1. januar - 31. desember

	Nota	2018	2017
		kr.	kr.
Leiguinntøkur, netto	1	225.388	222.530
Rentuinntøkur v.m.	2	2.394.949	8.040.599
Sakarmálsgjøld		235.350	340.812
Inntøkur til samans		2.855.687	8.603.941
Umsiting	3	-941.249	-894.658
Húsarakstur	4	-171.881	-230.090
Starvsfólkaútreiðslur	5	-3.093.695	-3.093.580
Rakstur av ognum í fyribils varðveitslu	6	0	9.145
Búnaðarstovan		-2.940.000	-2.940.000
Úrslit áðrenn avsetingar		-4.291.138	1.454.758
Niðurskriving til tap upp á útlán og staðfest tap	7	185.200	2.193.151
Úrslit áðrenn skatt		-4.105.938	3.647.909
Skattur av ársúrslitinum		0	0
Ársúrslit		-4.105.938	3.647.909

Fíggjarstøða 31. desember

	Nota	2018	2017
		kr.	kr.
OGN			
Ogn í umferð			
Áogn			
Útlán og niðurskriving til tap	8	88.265.051	87.679.502
Onnur áogn	9	2.484.407	2.923.247
		90.749.458	90.602.749
Virðisbrøv		200.957.207	205.720.755
Tøkur peningur	10	24.254.355	21.447.216
Ogn í umferð til samans		315.961.020	317.770.720
OGN TIL SAMANS		315.961.020	317.770.720

Fíggjarstøða 31. desember

	Nota	2018	2017
		kr.	kr.
SKYLDUR			
Eginogn			
Høvuðsgrunnurin	11	100.860.800	104.966.738
Festikontur	12	136.224.364	135.663.590
Felags festipulja	13	54.411.773	47.907.070
Kontur fyri mist bit	14	11.556.382	11.465.268
Kolagrevstrargrunnurin		16.803	16.803
Eginogn til samans		303.070.122	300.019.469
Skuld			
Stuttfreistað skuld			
Kreditorskuld		70.890	82.801
Onnur skuld	15	12.820.008	17.669.250
Skuld til samans		12.890.898	17.751.251
SKYLDUR TIL SAMANS		315.961.020	317.770.720
Veðsetingar og trygdarveitingar	16		
Eventualognir	17		

Notur

1 Leiguinntøkur

	2018	2017
	kr.	kr.
Festileiga	24.397	24.370
Traðarleiga	151.991	139.160
Festigjøld við skifti	48.000	58.000
Leiga av lendi	1.000	1.000
	225.388	222.530

2 Rentuinntøkur v.m.

Rentur av útlánum	3.238.571	3.256.294
Rentur og kursjavningar av virðisbrøvum	-947.523	4.312.041
Rentur av innistandandi peningi o.a.	266	303
Rentur av eftirstøðum	103.635	471.961
	2.394.949	8.040.599

3 Umsiting

Løgfrøðilig og serkøn hjálp	167.580	217.450
Postgjald	11.046	12.557
Grannskoðan	48.500	97.000
Roknskaparhjálp v.m.	78.300	27.000
Vistir	40.560	38.890
Tinglesing	-3.375	7.931
Ymiskt	22.119	41.637
Námsferðir	9.487	20.789
Stuðul	10.000	10.000
Tryggingar	59.282	41.990
Edv-útreiðslur	297.754	209.800
Telefon	28.666	51.506
Internet	17.923	18.056
Haldaragjald, bløð o.a.	40.998	58.868
Aðrar skrivstovuútreiðslur	112.409	41.184
	941.249	894.658

Notur

4 Húsarakstur

	2018	2017
	kr.	kr.
Viðlíkahald	7.922	67.208
Reingerð o.a.	52.156	73.113
Ljós og hiti	43.506	39.177
Urtagarðurin	41.072	28.032
Kavarudding v.m.	12.825	9.360
Ávaringarskipan	14.400	13.200
	171.881	230.090

5 Starvsfólkaútreiðslur

Lønir	2.293.621	2.251.110
Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnur	55.591	59.035
Arbeiðsloysistrygging	39.086	39.462
Barsilsskipanin	27.467	20.104
Eftirlønargjald	311.690	311.529
Lønir og lønargjøld til samans	2.727.455	2.681.240
Samsýning, Stýrið	355.000	390.000
Ferðapeningur	11.240	22.340
	3.093.695	3.093.580

6 Rakstur av ognum í fyribils varðveitslu

Vakstrarhúsið í Sandavági	0	-9.145
	0	-9.145

Notur

	2018	2017
	kr.	kr.
7 Niðurskriving til tap upp á útlán og staðfest tap		
Staðfest tap í árinum	153.779	4.220.943
Afturføring av áður framdum niðurskrivingum til tap upp á útlán	-315.545	-3.998.211
Broyting í niðurskrivingum upp á verandi lán	-23.434	-2.415.883
	-185.200	-2.193.151
8 Útlán og niðurskriving til tap		
Útlán	120.147.392	119.900.822
Niðurskriving til tap	-31.882.341	-32.221.320
	88.265.051	87.679.502
9 Onnur áogn		
Mvg-áogn	414.574	110.098
Onnur áogn	2.069.833	2.813.149
	2.484.407	2.923.247
10 Tøkur peningur		
Kassapeningur	319	319
Bank Nordik	14.736.249	15.160.405
Eik Banki	5.918.615	2.393.455
Suðuroyar Sparikassi	720.400	718.495
Norðoya Sparikassi	1.102.908	947.863
PP Capital (Jyske Bank)	53.366	219.626
Skandinaviska Enskilda Banken	1.722.498	2.007.052
	24.254.355	21.447.215

Notur

11 Høvuðsgrunnurin

	2018	2017
	kr.	kr.
Salda 1. januar	104.966.738	101.318.829
Rakstraravlop	-4.105.938	3.647.909
	100.860.800	104.966.738

12 Festikontur

Salda 1. januar	135.663.590	135.449.068
Søla av jørð	9.383.206	7.634.326
Inntøka av grótbrotum	293.585	575.522
Flutt til felags festipulju	-9.213.397	-8.851.599
Endurgjald frá Landsverk	50.168	1.241.723
Leiga	607.511	446.142
Alistøðir	69.689	206.498
	136.854.352	136.701.680
Nettoútgjøld	-629.988	-1.038.090
Festikontur 31. desember	136.224.364	135.663.590

13 Felags festipulja

Salda 1. januar	47.907.070	39.568.368
Flutt av festikontum	9.213.397	8.851.599
Útgjøld	-2.708.694	-515.397
Stuðul ridluskriðaverkætlan	0	2.500
Felags festipulja 31. desember	54.411.773	47.907.070

14 Kontur fyri mist bit

Salda 1. januar	11.465.268	10.575.049
Inngjøld	170.045	903.230
Útgjøld	-78.931	-13.011
Kontur fyri mist bit 31. desember	11.556.382	11.465.268

Notur

15 Onnur skuld (stuttfreistað)

	2018	2017
	kr.	kr.
Stráfóðurstuðul	0	4.119.896
Tjóðsavnið/MMR – antikvariska serskipan í Koltri	3.577.160	4.026.018
Búnaðarstovan – serføroysk húsdjór	782.865	835.570
Búnaðarstovan – ábøtur á bygningar	4.919.983	5.147.766
Búnaðarstovan – rakstur	3.540.000	3.540.000
	12.820.008	17.669.250

16 Veðsetingar og trygdarveitingar

Ongar veðsetingar hvíla á grunninum. Grunnurin er partur í tveimum rættarmálum. Mett verður regluliga um hesi mál, og neyðugar avsetingar verða gjørdar, har mett verður, at vandi er fyri tapi. Mett verður ikki, at hesi rættarmál fara at hava serliga ávirkan á fíggjarligu støðu grunsins.

17 Eventualognir

Grunnurin hevur við árslok 2018 eina møguliga skattaáogn á 2.262 tkr.